ítróttur

Nr. 142 • leygardagur • 27. juli 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Havnar Róðrarfelag eigur nógvar vinir

Áhugin fyri kappróðrinum í høvuðsstaðnum er so stórur, sum hann kanska ongantíð hevur verið áður, og í morgin fara knapt hundrað fólk at arbeiða fyri felagið

KAPRÓÐRARVERTIR
Jóannes Hansen

Áhugin fyri kappróðrinum í Havn er so stórur sum nakrantíð, verður sagt úr Havnar Róðrarfelag undan Ólavsøkuni
Mynd: Savnsmynd

Í gjárkvøldið var samkoma í góðu felags hølunum hjá Havnar Róðrarfelag í Álakeri. Øll róðrarfólkini hjá Havnar Róðrarfelag vóru bjóðað til hugnaligt borðhald og til eitt gott kappróðrarprát.

Hóast síðstu tøkini í hesum róðrarárinum ikki verða tikin fyrrenn í morgin, so varð samkoman í gjárkvøldið. Royndirnar vísa, at tað er sera torført at hava sovorna samkomu eftir ólavsøkuróðurin ella aftaná at ólavsøkan er liðug. Ólavsøkuaftan eru ábyrgdarpersónarnir í Havnar Róðrarfelag upptiknir av at rudda av eftir ólavsøkuróðurin, og beint eftir ólavsøku plaga fleiri teirra, sum síðani heilt tíðliga á árinum hava lagt nógv størsta partin av frítíðini í at venja og kappast, at fara í summarfrí.

Ti varð samkoman hildin í gjárkvøldið. Og har var nógv at tosa um. Árið hevur higartil roynst væl hjá størsta felagnum í landinum, og spurningurin er, um tað í morgin fer at vera settur trumfur á eitt framúr róðrarár.

Síliið við gentumanning er longu meistari, og tað stendur upp til dreingjamanningina á Sílinum og til teir umborð á Havnarbátinum sjálvar at gera av, um Havnar Róðrarfelag skal vinna helmingin av teimum seks FM heitunum, sum tað verður kappast um.

– Tað skal ikki vera nøkur loyna, at vit í felagnum eru sera spent, og at vit møta nógvum havnarfólkum, sum eru serliga spent uppá, hvussu tað fer at ganga hjá Havnarbátinum. Tað skal ikki vera nøkur loyna, at 10–mannafarið er flaggskipið hjá okkum, og at tað hevur sera stóran týdning fyri felagið, at tað gongst honum væl. Men vit eru eisini sera spentir uppá, hvussu tað fer at hilnast hjá Sílinum. Genturnar hava vunnið hitt higartil, og hóast dreingirnir vóru kolldømdir á Skálafjørðinum, so eru teir í góðari støðu at vinna FM. Tað er ikki komið fyri síðani í 1974, at Síliið hevur vunnið FM bæði við gentumanning og dreingjamanning.

Vit hava sett tveimum umboðsmonnum fyri Havnar Róðrarfelag stevnu. Í nevndini eru fimm fólk: Heðin Hansen, Paul Kragesteen, Rúni Persson, Magni Nielsen og Jeanette Danielsen. Heðin er formaður og Paul næstsformaður, og tað er teir báðar, sum vit tosa við.

Hugsa frameftir

Í ár hevur felagið luttikið við fleiri manningum enn nakað annað felag hevur gjørt, og Havnar Róðrarfelag hevur ongantíð áður havt so nógvar manningar: Sílið við dreingjum og gentum, Drekin við dreingjum og gentum, Gongurólvur við kvinnum og monnum, Víkingur við monnum og kvinnum, Ørvur og so Havnarbáturin.

Bátarnir mugu allir metast at vera góðir, og tríggir av teimum eru nýggir. Undan kappingarbyrjan í ár smíðaði Sámal Hansen Sílið og Gongurólv, og á seinastu stevnunum verður róð í einum nýggjum Ørvi.

– Vit hava sera gott róðrarfólk. Kanska hevur ítróttarfólkið hjá okkum ongantíð verið so gott at havt við at gera áður, sum tað er nú. Tey bera seg professionelt at. Rúsdrekka er púra fremmant millum teirra, og tað sær heilt merkisvert út, um eitt ávirkað róðrarfólk kemur umborð á Smyril, tá kappróður hevur verið. Um tað skuldi komið fyri, so eru vit sera medvitandi um at steðga sovornum beinanvegin.

– Hetta er hugaligt, men tað setur eisini krøv til okkara. Rógvararnir rokna við góðum umstøðum. Tað vil eitt nú siga, at teir vilja hava bestu bátarnar. Tí kenna vit okkum noydd støðugt at umhugsa, um onkrir bátar skulu skiftast út. Vit hava ikki tikið avgerð um at skifta nakran bát út, men tað er møguleiki fyri tí, siga Heðin Hansen og Paul Kragesteen

Nógvir stuðlar

Fyrireikingarnar til ólavsøkuróðurin hevur Havnar Róðrarfelag ábyrgdina av. Magni Nielsen hevur ábyrgdina av at leggja fasta startin og røkja hann. Fleiri fremmandir bátar hava verið at sæð á Havnarvág í hesi vikuni.

Í morgin fara 90 fólk at vera í sving fyri felagið. Talan er eitt nú um 40 innkrevjarar og onnur hjálparfólk á Molanum, á økinum við Bursatanga, har bátarnir standa, á startmálinum og endamálinum og í bátum, sum liggja á og kring róðrarøkið, har Tórshavnar Sløkkilið tekur sær av trygdini. Og tað skulu eisini hjálparfólk til í sambandi við steypahandina. Torfinn Smith býráðslimur skal handa steyp og heiðurskrónur fyri ólavsøkuróðurin. Tað fer hann at gera á sama staði, sum løgmaður fer at handa útvarpssteypið og landsstýrismaðurin í mentamálum, Annlis Bjarkhamar fer at handa FM steypini.

– Vit plaga at tosa um Guttafelagið. Tað er nevndin í felagnum, og øll vinfólkini og gomlu rógvararnir, sum hjálpa til undan ólavsøkuni. Vit kenna eisini, at felagið eigur nógvar stuðlar millum virki og feløg í býnum. Tað er altíð torført at nevna nakran. Men Skipafelagið hjálpir okkum væl. Bæði við hølum og við at læna okkum plattar til áskoðararnar at standa á. Og bæði hjá teimum og Skipasmiðjuni stendur ikki á at læna okkum trukkar og flakar. Poul Mohr kann onkuntíð vera eitt sindur grummur, tá lærlingarnir ikki hava tíð at arbeiða yvir, tí teir skulu í bátarnar at venja, men tað stingur ikki djúpt, tí tað er eingin endi á hjálpseminum, tá vit heita á Skipasmiðjuna um at læna amboð og tilfar, vita formaðurin og næstformaðurin í Havnar Róðrarfelag at siga.

Hvussu nógvir áskoðarar fara at hyggja at kappróðri í morgin?

– Tað valdast sera nógv um veðrið. Metið sigst vera 5.500 áskoðarar, men vit høvdu verið nøgdir, um tað møttu yvir fýra túsund. Í fjør var veðrið vánaligt, og tað kendist á inntøkunum hjá okkum. Í summum kappingum kunnu viðhaldsfólkini koma fyri at fegnast um FM heitið, og í øðrum kappingum koma tey, tí tað er so framúr spennandi. Áskoðarainntøkurnar hava stóran týdning fyri felagið. Fyri at fáa inntøkurnar til veja fara útreiðslur burturav. Eitt nú er tann tíðin farin, tá tú í høvuðsstaðnum ført fólk at arbeiða á ólavsøku uttan at veita teimum samsýning. Men vit vóna, at inntøkurnar fara at roynast so mikið væl, at eitt sindur verður eftir til felagið og harvið framtíðar rakstur og kanska ílegur, er ynski hjá Heðini Hansen og Paul Kragesteen.

Hervið komu vit á mál í hesum prátinum um kappróður og tað, sum hevur við kappróður at gera. Tað síðsta í ár, og vónandi verður endin á róðrarárinum eins góður, sum róðrarárið higartil hevur verið.

Tað stendur til at bresta millum Eysturoyingin og Havnarbátin

Á Vestmenninginum meta teir møguleikan fyri FM heitinum vera burtur, men teir ætla sær við sigri á ólavsøku at hálvbjarga róðrarárinum

10–MANNAFØRINI
Jóannes Hansen

Seinastu árini hevur tað oftast verið avgjørt undan ólavsøkuróðrinum, hvør hevur vunnið FM heitið í kappingini millum 10–mannaføríni. Í fjør vann Havnarbáturin allar róðrarnar, og bæði í 1998 og í 1999 var tað Eysturoyingurin, sum vann allar róðrarnar.

Vestmenningurin var meistari í 2000, og tað er millum hesar tríggjar bátarnar, at kappingin um FM heitið stendur hesa ferð. Vestmenningurin er eitt sindur aftanfyri hinar báðar, og sambært formanninum á Vestmenningi, Jan Johannesen, so rokna teir ikki við møguleikanum at vinna FM:

– So skulu báðir kappingarneytarnir hjá okkum standa seg væl verri, enn teir hava gjørt. Men hesin veruleikin hevur ikki tikið mótið frá okkum. Undan vestanstevnuni løgu fleiri av manningini við spýggjusjúku. Teir komu so frætt fyri seg, at teir fingu róð, men orkan var ikki, sum hon plagar at vera. Nú eru allir væl fyri, og vit ætla okkum at gera ein orðuligan vørr á ólavsøku. Eydnast tað, fer tað at kennast sum eitt hálvt FM heiti. Men tað verður ikki sum at siga tað. Vit vita, at møtstøðan verður stór, og eg rokni við, at tað verður sera tætt, sigur Jan Johannesen. Hann og bátsfelagarnir hava hildið frí síðani mikukvøldið. Eins og undanfarnu árini, so hevur Vestmenningur ikki verið í Havnini og vant til ólavsøkuna.

Venja seg til stutta teinin

Á stigatalvuni er Eysturoyingur best fyri at vinna FM heitið. Treytin er, at teir í hvussu so er skulu halda Havnarbátin aftanfyri seg.

– Vit mugu ásanna, at tað ikki hevur hilnast so væl hjá okkum á stutta teininum, sum tað gjørdi, tá vit fyrr í summar róðu longru teinarnar. Nú hava vit vant nógv startin og spurtin, og vit hava fleiri ferðir verið í Havnini og vant, bæði í hesi og í síðstu viku, so vit trúgva uppá tað, sigur Rúni Lamhauge, sum er bátsformaður á Eysturoyinginum.

Hóast Eysturoyingurin og Tjaldrið hava vunnið nógv seinnu árini, so er tað bara ein av teimum, ið nú eru við Eysturoyinginum, sum áður hevur roynt at vinna FM. Hann var við, tá Eysturoyingurin í 1999 vann FM. Tað vil við øðrum orðum siga, at teir eru allir rættuliga FM svangir. Eysturoyingurin legði síðstu hond á ólavsøkufyrireikingarnar týskvøldið.

Eyka dámur á ólavsøkuna

Hóast fleiri royndir, so eydnaðist tað okkum ikki at fáa fatur á formanninum umborð á Havnarbátinum. Men tá vit í øðrum sambandi tosaðu við formannin og næstformannin í Havnar Róðrarfelag, so var eingin ivi hjá teimum í týdninginum av, at Havnarbáturin vinnur á ólavsøku og harvið vinnur FM heitið.

– 10–mannafarið er flaggskipið hjá okkum. Tær seinastu ferðirnar hevur gingið fint, men marginalirnir eru smáir. Um Havnarbáturin vinnur á ólavsøku og harvið vinnur FM, so setur tað serligan dám á ólavsøkuna hjá teimum mongu í høvuðsstaðnum, sum fylgja væl við. Tað verður sera spennandi, men vit hava álit á okkara monnum, søgdu Heðin Hansen og Paul Kragesteen.

Umframt teir tríggjar omanfyri nevndu bátarnar eru Nólsoyingurin og Klaksvíkingurin við í ólavsøkuróðrinum. Nólsoyingar venja ofta í Havnini. Tað hava klaksvíkingar ongantíð áður gjørt. Men týskvøldið í hesi vikuni sást Klaksvíkingurin á Havnarvág, har teir ítaðu málið av. Teir hava vónað at vinna ein róður í ár. Nú er bara ein møguleiki eftir!

Um Havnarbáturin vinnur á ólavsøku og harvið vinnur FM, so setur tað serligan dám á ólavsøkuna hjá teimum mongu í høvuðsstaðnum, sum fylgja væl við. Tað verður sera spennandi, men vit hava álit á okkara monnum, søgdu Heðin Hansen og Paul Kragesteen

Tríggir liggja borð um borð

Fípan Fagra var týskvøldið í Havnini og vandi í heimasjónum hjá kappingarneytunum báðum – Sílinum hjá Havnar Róðrarfelag og Bliki hjá Argja Róðrarfelag

5–MANNAFØR DREINGIR
Jóannes Hansen

Tann FM kappingin, har tað er tættast í oddinum, er tann millum dreingirnar. Klaksvíksdreingir í Fípuni Føgru eru bara eitt stig undan havnardreingjum í Sílinum og argjadreingjum í Bliki. Tann av hesum trimum bátunum, sum verður fyrstur á mál, vinnur FM heitið.

Tað hevur ikki hilnast so væl hjá Fípuni Føgru tær seinastu ferðirnar, men teir hava gott mót:

– Vit hava tikið í egnan barm. Kanska løgdu vit ikki nóg nógv í venjingina, eftir at tað gekk so væl í heimasjógvi og á Skálafjørðinum. Tað, sum er meini er, at tað ber væl til at venja nóg, men ikki at fáa so nógv burturúr. Hesum hava vit arbeitt nógv við síðstu tíðina, og vit vóna tað besta. Týskvøldið vóru vit í Havnini og vandu, og vit halda, at vit fingu nógv burturúr, sigur bátsformaðurin á Fípuni Føgru, John Mortensen.

Hóskvøldið varð Sílið flotað, men teir fingu ikki so nógv burturúr venjingini hetta kvøldið:

– Tað var rættuliga sjaskut, so tað gjørdist ikki so nógv. Men vit hava kanska gott av at hvíla, tí vit hava tikið venjingina í stórum álvara. Eftir teir seinastu róðrarnar er tað ikki undarligt, at vit halda okkum hava sera góðar møguleikar at vinna. Tað hevði verið sera hugaligt, tí so hevði nýggja Sílið vunnið FM bæði við gentum og dreingjum, heldur Jóan Pauli Jensen, sum er bátsformaður á Sílinum.

Blikur hevur ikki vunnið higartil í ár. Men argjadreingir hava framvegis góðan møguleika at vinna FM.

– Vit vunnu á vestanstevnu í fjør, og síðani hava vit verið frammarlaga, men vit hava ikki vunnið. Nú er síðsti møguleikin. Fleiri fella fyri aldursmarkinum, so vit høvdu einki havt ímóti at seta teir í Klaksvík og teir á Sílinum uppá pláss, skemtar Bárður Jacobsen, bátsformaðurin á Bliki, sum sigur seg hava gott mót um, at tað fer at eydnast.

TB skipar fyri fótbóltsskúla

FÓTBÓLTSSKÚLI
Páll Holm Johannesen

Beint eftir ólavsøku, 30 juli, skipar ungdómsdeildin hjá TB fyri fótbóltsskúla fyri tey ungu í felagnum. Tað verður fyrrverandi TB-venjarin, Svend Petersen, ið verður høvuðsvenjari á skúlanum.

Fult teknað

Pláss er fyri 100 luttakarum, og sagt verður av Tvøroyri, at longu er fullteknað. Fótbóltsskúlin fer fram á vøllinum á Sevmýri, í báðum skúlagørðunum og í høllini í Trongisvági.

Úr TB siga tey, at orsøkin til, at felagið skipar fyri einum fótbóltsskúla er, at fótbóltskúlarnir, sum FSF skipar fyri er ikki nóg góðir.

Ætlanin er, at bæði fyrrverandi – og núverandi leikarar hjá TB skulu hjálpa Svend Petersen við fótbóltsskúlanum.

Skúlin fevnir yvir fýra dagar, og er bert fyri børnum, ið eru knýtt at TB. Fótbóltsskúlin byrjar týsdagin kl. 9.30.

At enda verður sagt frá fyrireikararnum, at luttakararnir skulu bæði hava innandura- og uttandura skógvar við týsdagin.